# Nú vil landsstýrið hava greitt svar frá suðuroyingum

**Nú vil landsstýrið hava endaligt svar frá suðuroyingum um teir taka undir við at flyta miðnámsskúlan og heilsuskúlan til Hovs og at byggja røktarheim í Vági ístaðin**

ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Hetta er ein máti hjá suðuroyingum at fáa eitt harðliga tiltrongt røktarheim bygt í Suðuroy beinanvegin, sigur Hans Pauli Strøm*

Nú vil landsstýrið hava eina endaliga avgerð um ætlanina at byggja røktarheim í Vági og at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági og ætlaða heilsuskúlan á Tvøroyri til Hovs.

Tað hevur landsstýrið nú boðað øllum teimum sjey nývaldu bý- og bygdaráðunum í Suðuroy, frá.

Týsdagin sendu Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, øllum teimum sjey nývaldu bý- og bygdaráðunum í Suðuroy, skriv um ætlanina.

Í skrivinum verða tey nývaldu kommunustýrini spurd, hvørja støðu tey hava til ætlanina at flyta miðnámsskúlan og heilsuskúlan til Hovs og at byggja røktarheim til 35 fólk í Vági ístaðin.

Teir báðir meta eisini, at málið hevur skund og tí hava teir biðið kommunustýrini svara í hesum mánaðinum.

Tað hevur skund at fáa eina avgerð í málinum, tí ætlanin er annars at byggja miðnámsskúla í Vági er nú komin so mikið langt, at arbeiðið skuldi bjóðast út fyrsta dagin.

Nevndin, sum fyrireikar byggingina, hevur søkt Vágs Býráð um byggiloyvi til skúlan og í umsóknini stendur, at ætlanin er at bjóða skúlan út um miðjan januar, ella um eina viku.

Men landsstýrismaðurin í skúlamálum sigur, at í hesum sambandi hevur bygginnevndin nú fingið boð um at bíða við at bjóða skúlan út.

– Eg ætli mær ikki at bøla omaná málinum, men tað verður neyðugt at bíða við útbjóðingini til tey nývaldu kommunustýrini hava fingið høvi at sagt sína hugsan um ætlanina at flyta skúlan til Hovs, og at byggja røktarheim í Vági ístaðin.

– Men júst tí at ætlanin ikki er at seinka málinum, verður tað eisini neyðugt, at kommunustýrini svara longu í hesum mánaðinum. Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at bæði undanfarna bygdaráð í Hvalba og i Sumba, boðaðu í fjør landsstýrinum frá, at tey taka undir við ætlanini og fráfarna bygdaráðið í Hovi var eisini vælviljað.

Hinvegin hevur Vágs Býráð einmælt víst ætlanini frá sær.

Men Landsstýrið vil nú hava tey nýggju kommunustýrini at siga sína hugsan eisini.

## Einans eitt tilboð

Jògvan á Lakjuni sigur, at tað, sum landsstýrið ætlar við skrivinum, sum nú er sent kommununum í Suðuroy, er at fáa at vita, hvørja støðu tey hava til ætlanina.

– Ætlanin er ikki, at tey skulu binda seg til nakað sum helst enn. Ætlanin er einans at fáa at vita, um tey taka undir við hugskotinum, so at landsstýrið kann vita, um hetta er nakað at arbeiða víðari við.

– Taka kommunustýrini í Suðuroy undir við hugskotinum, eri eg og landsstýrismaðurin í almannamálum, sinnaðir at hitta tey á fundi at greiða nærri frá ætlanini, sigur Jógvan á Lakjuni.

Men hann leggur eisini dent á, at ætlanin er ikki at noyða kommunurnar í Suðuroy til nakað sum helst.

– Taka tær ikki undir við hugskotinum, verður arbeitt víðari við upprunaligu ætlanini og so verður miðnámsskúlin í Vági bjóðaður út sum ætlað.

Sjálvur ivast hann ikki í, at tað einasta rætta er at byggja heilsuskúlan og miðnámsskúlan saman.

– Verða lunnar lagdir undir einum skúladepli í Suðuroy, er størri møguleika fyri at eisini aðrir skúla fara at verða lagdir í depilin, sum frálíður, sigur hann

Men Hans Pauli Strøm leggur dent á, at hetta er ein máti hjá suðuroyingum at fáa eitt røktarheim bygt í oynni beinanvegin.

– Tørvurin á røktarheimsplássum í Suðuroy er stórur og eitt røktarheim til 35 fólk, hevði gjørt sera stóran mun í oynni, sigur hann.

Men hann leggur afturat, at taka kommunurnar í Suðuroy ikki av ætlanini, verður heldur onki røktarheim bygt í Suðuroy nú.

– So kemur Suðuroy í somu støðu sum øll onnur øki í landinum og noyðast at bíða, til ein tørvsmeting í øllum landinum er gjørd. Samstundis skal ein ein verklagslóg gerast og greiða skal eisini fáast á, hvussu nógv kann setast á fíggjarlógina til økið.

– Og so fær Suðuroyggin sítt pláss í eini raðfesting, sum fer at umfata øll øki í landinum, sigur Hans Pauli Strøm.

Tó ivast hann ikki í, at Suðuroyggin fer at standa nakað frammaliga, tá ið eldrabýli í teimum ymsu økjunum, skulu raðfestast, tí saman við Norðoyggjum, Suðurstreymoy, er Suðuroyggin serliga illa fyri, sigur Hans Pauli Strøm.

Men nær tað verður, veit hann ikki, tí fyrireikingarnar taka eisini sina tíð og tað veldst eisini um, hvussu stór fíggjarorkan verður.


*Ein endalig avgerð má fella nú og í mínum hugaheimi er ongin ivi um, at einasta rætta er at byggja miðnámsskúla og heilsuskúla saman í ein depil í Hovi. Tað ger eisini møguleikarnar fyri at fáa aðrar skúlar til Suðuroynna, størri, sigur Jógvan á Lakjuni*

# Býráðið skal staðfesta byggiloyvið til miðnámsskúlan í Vági

**Tekniska nevnd í Vágs Býráði hevur gingið umsóknini um byggiloyvi til miðnámsskúlan í Vági, á møti. Nú skal býráðið eisini viðgera umsóknina**

MIÐNÁMSSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*– Hetta er nógv størsta mál, sum vit hava havt til viðgerðar og tí er tað rætt, at tað eisini verður lagt fyri alt býráðið til endaliga støðutakan, sigur Dánjal Bjarkhamar, formaður í teknisku nevnd hjá Vágs Býráði*

Ætlaði miðnámsskúlin í Vági, hevur nú fingið byggiloyvi.

Tað er greitt, eftir at tekniska nevnd í Vágs býráð hevði fund týskvøldið.

Bygginevndin, sum fyrireikar arbeiðið at byggja skúlan, søkti beint fyri jól, Vágs Býráð um byggiloyvi til skúlan.

Í umsóknini, sum varð send vegna mentamálaráðið, varð biðið um eina skjóta viðgerð, tí ætlanin var at bjóða skúlan út um hálvan januar, ella um eina viku.

Hetta umstrídda málið var sostatt tað allarfyrsta málið, sum nývalda tekniska nevndin í Býráðnum, fekk til viðgerðar.

Og á fundi týsdagin samtykti nevndin at geva skúlanum byggiloyvi.

Men av tí at hetta er nógv størsta bygimál, sum nakrantíð hevur verið fyri í Vágs býráði, í hvussu so er í pengum, heldur nevndin at tað er rætt, at býráðið eisini fær umsóknina til viðgerðar og staðfestir avgerðina í teknisku nevnd.

Tað skuldi eftir ætlan henda á býráðsfundi heilt skjótt.

Men sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, hevur landsstýrið biðið nevndina, sum fyrireikar bygginina, drála við at bjóða skúlan út.

Samstundis hevur landsstýrið spurt allar kommunurnar í oynni, hvørja støðu tær hava til ætlanina at flyta ætlaða skúlan til Hovs og at leggja hann í ein skúladepil har, og at byggja røktarheim í Vági ístaðin.

Kommunurnar skulu svara í hesum mánaðinum og fyrrenn tað málið er avgreitt, verður endalig støða ikki tikin til, hvar skúlin skal vera